**SÝSLUMAÐURIN**
**STREYMOYAR SÝSLA**
Postboks 3018 · FO-110 Tórshavn
Tlf. (+298) 35 14 48

# KUNNGERÐ

Við hesum verður boðað til grannastevnu á Langasandi mikudagin tann 1. juli 2009 kl. 1300 í skúlanum við fylgandi skrá:

1. Útskiftinggarmál
– Útskifting av Langasandshaga

Bert eigarar og tey sum hava fulltrúð frá eigara, hava atkvøðurætt í nevndu málum. Eru fleiri eigarar av einum matr. og bert tann eini eigarin møtur, skal fulltrú fyriliggja frá hinum eigarunum, um hesir ynskja at teirra partur av matr. skal luttaka í atkvøðugreiðsluni.

Fulltrúir skulu vera dagfestar og geva rætt til atkvøðugreiðslu á grannastevnuni á Langasandi. Fulltrúirnar skulu handast sýslumanninum, tá ið atkvøtt verður.

*Sýslumaðurin í Streymoy tann 26. mei 2009.*

***Andras Marr Poulsen***



Mötley Crüe konsert

Tvey atgongumerkir til Mötley Crüe konsert í KB-Hallen 10. Juni eru til sølu fyri 495,- kr. pr stk.

ÁHUGAÐI RINGIÐ Á 220022

**NES KOMMUNA**
650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Kunngerð

Vísandi til kunngerð frá Ríkisumboðnum um fólkaatkvøðu í samband við broyting av »trónarvalógin«, so fer henda fram

**Sunnudagin tann 07. juni 2009**

**Atkvøðugreiðslan fer fram:**
í fundarhølinum, á Toftum.

**Atkvøðutíðin er frá:**
kl. 09.00 til 20.00

ella so leingi veljarar møta uttan steðg.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin, ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu gera hetta á kommunuskrivstovuni í vanligari arbeiðstíð fram til og við fríggjadagin 5. juni 2009 við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøðurnar skulu vera valstýrinum í hendi innan valið byrjar kl. 09,00 tann 07. juni 2009.

**Heimaval**
Veljarar, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagið fríggjadagin tann 05. juni 2009, við at boða frá til fólkayvirlitið á kommunuskrivstovuni tlf. 447586 helst innan kl. 15.00.

**Valkort**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna og valkortini verða sent út við postinum til allar veljarar, ið standa á vallistanum. Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal verða sagt kommunuskrivstovuni frá sum skjótast.

Minnist til at hava valkortið við á valstaðið.

*Toftir, hin 27. mai 2009*

**Valstýrið í Nes kommunu**

**SÝSLUMAÐURIN**
**VÁGA SÝSLA**
Postboks 39 · FO-370 Miðvágur
Tlf. (+298) 33 34 48

# KUNNGERÐ

Við hesum verður boðað til grannastevnu í Mykinesi fríggjadagin tann 26. juni 2009 kl. 1030 í skúlanum við fylgandi skrá:

**Fuglaveiða í Mykinesi**

Mál 1:

a) Endurskoðan av skipanini viðv. lundaveiðu á allari oynni.

b) Friðing av Hólminium fyri lundafleyggj alt árið 2009.

c) Skipan av súluveiðu á Bølinum

**Útskiftinggarmál**
– Útskifting av Lýðarhaga í Mykinesi

Mál 2:

a) Handaná festið fær einbýttan haga

b) Útistovu festið fær einbýttan haga

c) Ognarjørðin fær einbýttan haga

Mál 3:

a) Útistovu festið fær einbýttan haga

Bert eigarar og tey sum hava fulltrúð frá eigara, hava atkvøðurætt í nevndu málum. Eru fleiri eigarar av einum matr. og bert tann eini eigarin møtur, skal fulltrú fyriliggja frá hinum eigarunum, um hesir ynskja at teirra partur av matr. skal luttaka í atkvøðugreiðsluni.

Fulltrúir skulu vera dagfestar og geva rætt til atkvøðugreiðslu á grannastevnuni í Mykinesi. Fulltrúirnar skulu handast sýslumanninum, tá ið atkvøtt verður.

*Sýslumaðurin í Vágum tann 26. mei 2009.*

***Andras Marr Poulsen***




Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.
**Tel. 34 18 00**
**lysing@sosialurin.fo**
**Ring og fá ein prís!** Sosialurin



Bygningur til sølu ella leigu

Bygningur í Niels Finsensgøtu 51, sum í løtuni verður nýttur til handil og hotell, er til sølu ella leigu. Bygningurin er sera væl egnaður til virksemi sum t.d. skrivstovu, matstovu, salong og til stovn. Bygningurin liggur væl fyri í miðbýnum. Lagalig fígging fæst. Ring og hoyr nærri á 21 33 03.